# Bakkafrost – eitt



– Tað er kanska ikki tað mest áhugaverda arbeiðið at pilka bein úr flaki. Men tað skal so gerast, sigur Sigrid Gaardbo úr Søldarfirði





**Bakkafrost á Glyvrum er kent fyri góðu framleiðslu sína úr laksi. – Hetta er eisini eitt gott arbeiðspláss, eru tvey av starvsfólkunum – Mariann Nielsen og Sigrid Gaardbo – eisini samdar um**

FISKAARBEIÐI

*Snorri Brend*

*Myndir: Jens Kr. Vang*

**Glyvrar:** Tá ein tosar um fiskaarbeiði her á landi, so eru tað mong sum yppa øksl um tað.

Summi siga beinleiðis, at hetta kundu tey ikki droymt um at tykist við. Og so serliga ikki sum tilkomin og eldri.

Fiskaarbeiði er ikki nakað við framtíð í sær, verður sagt. Ikki nakað, sum mong ungfólk høvdu viljað brúkt sína kostbaru tíð til.

Alt í lagi at arbeiða á einum flakavirki eina einstaka summarferiu. Men soleiðis at hava til sítt lívsstarv, – nei, tað er óhugsandi.

At skula fara til fara til arbeiðis kl. 8 á morgni og so fara til hús aftur, tá ein er vorðin 67! Ein slík hugsan man ræða mong.

Men tá ein soleiðis vitjar virkir kring landið, so eru tað framvegis fólk sum trívast í hesum arbeiðinum. Summi hava veruliga havt hetta sum sítt lívsverk, og kundu ikki hugsað sær at gjørt nakað annað enn júst hetta.

Hóast tað mangan hevur verið óstøðugt arbeiði, og haraftrat eisini ótespiligt og kalt á vetri, so halda tey á eitt heilt lív í trúgvari tænastu á einum slíkum fiskavirki.

Vit hava hitt tvær konur, sum hava starvast á Bakkafrost í ávikavist 12 og 15 ár. Og tær trívast framvegis í arbeiðinum, – tær báðar Mariann Nielsen úr Saltangará og Sigrid Gaardbo úr Søldarfirði.

– Jú, her á Bakkafrost er sera gott at vera, halda tær báðar, nú vit fingu eitt orð við tær í farnu viku.

Á Bakkafrost arbeiða sjálvandi eisini menn. Men henda hósdagin í farnu viku, tá vit vitjaðu virkið, nýtt vit bert høvið at hitta hesar báðar kvinnurnar.

## Virkið virki

Beint fyri døgurða týsdagin í farnu viku var úr at gera á Bakkafrost.

Kvinnurnar í reinskeringini og pakkingini vóru fult upptiknar í arbeiði sínum, at tær nærum ikki sansaðu umboðunum fyri tíðindatænastuna sum vóru komin at vitja á virkinum.

Vit vórðu víst til formannin – ella forkvinnuna – í høllini. Hon sat í eftirlitsrúminum og tryggjaði sær, at tilgongdin av rávøru gekk nóg skjótt inn á virkið og at alt kom úr aftur sum skjótast.

Ætlanin var at fáa orðið á onkra av hesum kvinnum, sum á sín serliga hátt eru við til at tryggja útflutning okkara.

Ivasamt mundi kortini vera, um tað fór at eydnast, tí her treyt ikki arbeiði. Neyvan var nøkur teirra serliga hugað at verða avbrotin í arbeiðinum, bert tí Sosialurin var komin á vitjan.

Klokkan var farin at nærkast hálvgum tólv, og nú var farið at styttast til døgurðasteðgin. Kanska onkur kundi takast burtur frá, nú so stutt var eftir til middags.